**Skúlastýrisfundur**

Dato: 16.09.2014

Tíð: 17:15 – 19:15

Stað: Í Kvívíkar skúla saman við skúlastýrinum í Vestmanna skúla

Til staðar: Jórun Simonsen, Elspa Petersen, Tummas Marni Joensen, Turið á Tórgarði, Heri Müller, Høgni Warberg og skúlastýrið í Vestmanna skúla.

Andrea á Rípuni hevði givið avboð til henda fund.

Skrivari: Høgni Warberg

skrá:

1. Rundvísing
2. Tímatalvur
3. Busskoyring
4. Samstarv um 7. flokk
5. Ymiskt

Att 1: Høgni stóð fyri rundvísing í Kvívíkar skúla.

Att 2: Umboð frá skúlastýrinum í Kvívík spurdu um eitthvørt kann gerast við tímatalvuna í Vestmanna skúla, soleiðis at hon kemur at passa betur til busskoyringina sum heild. Ólavur, skúlastjóri í Vestmanna skúla, segði, at skúlin eigur at hava forrætt í mun frítíðarítriv og ítrótt aftaná skúlatíð, har ítrótturin og frítíðarlívið má tillaga seg í mun til skúlan og ikki øvugt. Ólavur vísti á, at tað er eitt stórt baks at leggja tímatalvu og at fáa tímatalvurnar at ganga upp. Jórun gjørdi vart við, at ítróttur er sera gott og týdningarmikið fyri samtíðarinnar børn. Heri Müller nevndi møguleikan fyri, at næmingar frá Kvívíkar skúli framyvir í staðin fyri at fara í framhaldsdeild í Vestmanna skúla kunnu fara í framhaldsdeild í øðrum skúla.

Att 3: Tosað varð um, at viðurskiftini viðvíkjandi skúlakoyring hjá børnunum í Kvívík ikki eru nøktandi. Bussarnir koyra ov sjálvdan og tíðirnar passa illa, soleiðis at børnini ofta noyðast at bíða leingi. Gjørt var vart við, at skúlastýrini bæði fáa onki gjørt, uttan at boða kommununum frá trupulleikunum. Tað er nógv bíligari fyri Kvívíkar kommunu at nýta SSL enn sum fyrr at hava skúlabuss  Samtykt varð, at báðar skúlastýrisforkvinnurnar í felag skulu senda eitt skriv til Kvívíkar Kommunu viðvíkjandi umstøðunum í samband við skúlakoyringina hjá skúlabørnunum í kommununi, har ynski verður sett fram um eina afturmelding frá kommununi uppá trupulleikan.

Att 4: Tað var breið semja um, at stórur vilji var til staðar at fáa eitt gott og mennandi samstarv millum Kvívíkar skúla og Vestmanna skúla. Eitt hugskot var, at flokkar frá Kvívíkar skúla kunnu vitja Vestmanna skúla og vice versa.  At vit kunnu menna eitt fakligt samstarv, har lærarar frá báðum skúlunum kunnu vera við til at stuðla og menna hvønn annan, við m.a. at greiða hvørjum øðrum frá sínum lærutilfari og læruætlanum. At tað gerst meira ein samanhangur, samsvar og kontinuerlig yvirgongd hjá næmingunum frá Kvívíkar til Vesmanna skúla. Eitt hugskot varð nevnt um, at tað kann skipast fyri felags-seturskúla í Føroyum, har flokkar frá Vestmanna og Kvívík fara saman í seturskúla. Ólavur og Høgni fara at tosa saman um samstarv millum Kvívíkar- og Vestmanna skúla.

Att 5: Tosað varð um, hvussu skúlarnir í felag kunnu verða fyrireikaðir, um so er at bygnaðarbroytingar innan skúlaskipanina skulu fremjast og skúlar verða álagdir at leggja saman ella skulu verða skipaðir í størri skúlaeindir. Eitt uppskot kundi t.d. verið, at 0. til 4. flokkur kunnu vera í Kvívíkar skúla og hinir eldri flokkarnir í Vestmanna, eins og aðrir møguleikar eisini eru til staðar.

Harumframt varð tosað um fyrimunirnar við at seta á stovn forskúlaflokkar, soleiðis at børnini fáa eina betri og smidligari yvirgongd frá barnagarð til skúla

Fundur millum bæði skúlastýrini verður aftur mikukvøldið tann 9. september 2015 kl. 17:15 í Vestmanna skúla

Vegna skúlastýrið í Kvívík

Høgni Warberg